# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# POLITIKKUR IKKI LOGIKKUR

Politikkur kann mangan verða trupul at skilja. Fyri nøkrum fáum vikum síðani samtykti løgtingið einmælt at fara undir at leingja flogvøllin í Vágum til 1799 metrar. Men frammanundan hevur sama løgting sett í verk eina kanning, sum skal lýsa, hvar bestu møguleikar eru at byggja flogvøll, havandi veður og vind og turbolens í huga.

Tá løgtingið viðgjørdi leingjanina av flogvøllinum, hoyrdust nakrar mótmælandi røddir á tingi. Eitt nú Sjúrður Skaale úr Tjóðveldi, Poul Michelsen úr Fólkaflokkinum og John Johannessen úr Javnaðarflokkinum. Teir mæltu til, at løgtingið bíðaði við at avgreiða málið, til hendan frágreiðing, sum Landsverk legði fram í gjár, var komin.

Men løgtingið vildi ikki bíða. Málið skuldi fyri alt í verðini avgreiðast, hóast frágreiðing var á trappuni – og eisini vitandi um, at hon kanska kundi mæla til eina aðra loysn til framtíðar flogvøll, enn at útbyggja vøllin í Vágum.

Tað er hetta, sum er so løgið við politikki: Tú hevur eina ætlan, tú hevur eitt motiv, og tú hevur ein politiskan boðskap ella politiskan vilja, sum ofta er so tungvigandi, tá avgerðir skulu takast. Tá so »vandi« er fyri, at onkur serkunnleiki kanska fer at taka grundarlagið undan endamálinum, so trumlar tú bara málið ígjøgnum, so tað ikki kann steðgast. Hetta verður gjørt fyri pengar, sum vit øll rinda.

Tað sum fyri vanlig fólk hevði verið rætta mannagongdin og rætta viðgerðartilgongdin var, at øll viðurskifti vóru væl umhugsað, at allar kanningar vórðu lagdar við, so tey, ið skulu taka støðu, høvdu eitt so gott grundarlag at taka støðu út frá, sum gjørligt.

Men soleiðis er ikki gjørt í hesum málið. Vit kunnu staðfesta, at løgtingið hevur valt at brúka hálvtfrórðhundrað milliónir upp á eina ætlan, sum ein serkunnleiki ikki heldur verða góða. Hví verður hetta gjørt? Er tað tí, at Vinnumálaráðið og løgtingið vita betur enn tey, ið hava gjørt hesa kanningina?



**» Málið skuldi fyri alt í verðini avgreiðast, hóast frágreiðing var á trappuni**

Ein undanførsla hevur verið, at sagt verður, at donsku pengarnir eru markaðir til flogvøllin í Vágum. Spurningurin er, um myndugleikarnir hava roynt, um til ber at marka pengarnar umaftur. Politikkur og logikkur eru í øllum førum ikki tað sama.

# Vit livdu ikki upp til góðan fjølmiðlasið



– Eg eri sera fegin um, at Kringvarpið nú tekur skuldsetingarnar móti Rás2 um mutur aftur.

Hetta sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2. Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarpinum, hevur sent honum ein teldupost við eini treytaleysari umbering fyri skuldsetingarnar, sum vórðu settar fram ímóti Rás2 í sendingini Álvaratos fríggjadagin.

– Vegna vertin í sendingini, *Álvaratos*, harmist eg almikið úttalilsið um, at tíðindi kunnu keypast á útvarpsrásini hjá tykkum, uttan at prógv varð ført fram fyri hesum í somu sendig. Afturat hesum áttu tit at havt møguleika fyri at gera tykkara viðmerkingar. Hetta livdi ikki upp til krøvini um góðan fjølmiðlasið, sigur Annika Mittún Jacobsen í teldupostinum.

Hon greiðir víðari frá, at talan var um eina kjaksending, har ein grein úr Miðlahúsinum varð nýtt sum dømi í viðgerðini av evninum »journalistikkur og pengar«.

– Ætlanin var sostatt ikki at viðgera Miðlahúsið, men tá ið talan er um eina kjaksending, gerast fólk stundum heit. Og tá kann tað henda, at okkurt fer í luftina, sum ikki átti at verið farið. Í sambandi við slíkar sendingar tosa vit sjálvandi frammanundan um, hvat vit kunnu siga og ikki. Alt er loyvt, uttan at banna og verða ósaklig yvir fyri navngivnum fólki og fyritøkum. Fríggjadagin hendi so tað, sum ikki skuldi henda, og eg rokni við, at eingin er keddari, enn just verturin, sum orðini átti! Vit hava klipt viðmerkingina úr sendingini, soleiðis at hon ikki er at hoyra – hvørki á netinum ella tá sendingin verður endursend. Enn einaferð: Vit harmast almikið hendiliga óhappið, sigur Annika Mittún Jacobsen.

*eirikur@sosialurin.fo*



**» Víga fráskild í Klaksvík**

MAGNUS BRAHÉ JØRGENSEN
KJAK Á SÍÐU 13



**» Mugu duga at telja upp í 17**

HELGI ABRAHAMSEN
KJAK Á SÍÐU 13

# Jákup fer at biðja um umbering

Tá sendingin Álvaratos frá fríggjadegnum verður endursend í Kringvarpinum í morgin, hósdagin, klokkan 13, fer Jákup Magnussen at biða um umbering fyri skuldsetingarnar, sum hann setti fram ímóti Rás2 um, at fyritøkur kunnu keypa seg til tíðindini, sum eru at hoyra í tíðindasendingunum hjá Rás2.

Annika Mittún Jacobsen, kringvarpstjóri, sigur, at eingin er keddari um mistakið enn Jákup Magnussen, sum í morgin klokkan 13 alment fer at greiða lurtarunum frá mistakinum og biðja um umbering fyri, at



Kringvarpið ikki livdi upp til góðan fjølmiðlasið.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Hanna á Reynatúgvu forkvinna

Hanna á Reynatúgvu nýggj forkvinna í Sandoyar Sýslu Ferðalag. Á fundinum, ið nýggja nevndin hjá Sandoyar Sýslu Ferðalag hevði týskvøldið, varð Hanna á Reynatúgvu vald til forkvinnu í felagnum, meðan Anja Sandoy varð vald til næstforkvinnu og Kristina Petersen til kassameistara.

Hini í nevndini eru Oddvør Johannesen og Julianna Winther. Eykafólk eru Elna Skylv Hansen og Atli Dalsgarð.

Sosialurin Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Jaspur Langgaard
jaspur@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*